KLAKSVÍKAR KOMMUNA

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 26.06.2025 kl. 17:30
Málnr.: 24/01278 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl H. Johansen, Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen, Hermann R. Samuelsen, Anfinn í Toft, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen
Varalimir: Mildrid á Lógv møtti fyri Anfinn í Toft
Ikki møtt:
Onnur: John Færø, virkandi kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
51/25	25/00008-17	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Anfinn í Toft
52/25	23/00686-20	Sjógvhitabólkur 2025
53/25	25/00762-2	Marknaumskipan millum matr.nr. 1214a, 1224 og 1213a
54/25	25/00537-5	Umsókn um keyp av lendi undir hjallum í Gerðum
55/25	25/00751-1	Víðarisøla av matr.nr. 25h, Norðoyri
56/25	25/00701-2	Gólvið í KÍ-høllini – *eykajáttan, seinna viðgerð*
57/25	25/00772-1	KÍ-høllin – Hølini í norðurendanum
58/25	25/00557-3	Leiga av norðurendanum av KÍ-høllini til Snjallubjallu
59/25	25/00531-17	Goymslu- og framsýningarhøli til Rospiggen II
60/25	21/01331-119	Broyting av beni - matr.nr. 1646i - Ídnaðarøkið undir Hamri
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
61/25	21/01784-108	Eystan Garð
62/25	24/01013-16	Innafturtøka av stykki
63/25	24/00581-3	Møgulig søla - støðutakan
64/25	22/00079-3	Leigusáttmáli
65/25	24/01153-9	Leigusáttmáli
66/25	25/00280-3	Keyp/leiga av ogn
67/25	25/00467-18	Íbúðaverkætlan - støðutakan

68/25	25/00816-1	Møgulig víðkan av øki
69/25	22/00675-11	Útbygging av dagstovni
70/25	25/00690-11	Møgulig søla - støðutakan

Til viðgerðar

51/25
25/00008-17 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Anfinn í Toft

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	51/25

25/00008-17 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Anfinn í Toft

Frágreiðing um málið:
Anfinn í Toft, býráðslimur hevur boðað frá, at hann ikki fær røkt býráðsarbeiðið í tíðarskeiðinum 19. juni til 3. juli. Næstvalda á valevnislistanum er Mildrid á Lógv.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 2 og 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Anfinn í Toft.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Einmælt samtykt at lata Mildrid á Lógv taka sæti til fundin.

52/25
23/00686-20 Sjógvhitabólkur 2025

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.06.2025	64/25
2 Tekniska Nevnd	18.06.2025	43/25
3 Fíggjarnevndin	24.06.2025	83/25
4 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	52/25

23/00686-20 Sjógvhitabólkur 2025

Frágreiðing um málið:
Í mars umfarinum varð biðið um heimild til at seta ferð á víðari arbeiðið við sjógvhitaskipan kommununnar og politiska viðgerð av møguligum umraðfestingum av íløgum kommununnar í inniverandi ári, til síðani at verða lagdar fyri nevndir og býráðið aftur í fyrstkomandi umførum.

Á fíggjarnevndarfundi 18. mars 2025 mælti nevndin til ein arbeiðsbólk við hesum umboðum: forfólkið í UBN ella TN, sum verður forfólk í bólkinum, eitt umboð fyri býráðsminnilutan og tekniski stjórin. Omanfyri nevndu umboð vóru á fundi 3. juni 2025 samd um, at ein sjógvhitabólkur verður skipaður við fylgjandi umboðum:

- *Anfinn í Toft* forfólk í UBN og forfólk í bólkinum
- *Oddmar á Lakjuni* umboð frá býráðsminnilutanum
- *Andreas Andreassen* tekniski stjórin

Eitt av endamálunum hjá bólkinum er, at kommunan saman við íleggjarum stovnar felag, sum skal reka sjógvhitaskipanina við tí fyri eygað, at skipanin kann veksa og knýta fleiri brúkarar aftrat.
Hetta er ein liður í grøna orkuskiftinum og stuðlar eisini ætlanini at skapa eina burðardygga kommunu.

Burðardygd og heimsmálini:
Verkætlanin stuðlar undir heimsmál nr. “7 Grøn orka”, “9 Vinna, nýskapan og undirstøðukervi” og “11 Burðardyggir býir og býlingar”.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Uppraðfesting og víðarimenning av sjógvhitaskipan verður goldin av konto “*sjógvhiti (íløgur)*” fyri avsetingina í 2025.

Tilmæli:
Mælt verður til, at bólkurin verður skipaður við omanfyri nevndu umboðum, og at arbeitt verður víðari við at menna sjógvhitaskipanina.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. juni 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-06-2025, men at býráðsminnilutin fær høvi at seta navn á sítt umboð á býráðsfundinum.

Tekniska Nevnd 18. juni 2025:
Nevndin tekur undir við UBN 16-06-2025.

Fíggjarnevndin 24. juni 2025:
Nevndin tekur undir við TN 18-06-2025.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Tilmælið frá FíN 24-06-2025 einmælt samtykt. Harumframt staðfesti býráðið, at limirnir í Sjógvhitabólkinum eru *Anfinn í Toft, Oddmar á Lakjuni og Andreas Andreassen.*

53/25
25/00762-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1214a, 1224 og 1213a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.06.2025	78/25
2 Tekniska Nevnd	18.06.2025	46/25
3 Fíggjarnevndin	24.06.2025	80/25
4 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	53/25

25/00762-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1214a, 1224 og 1213a

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av matr.nr. 1224 og 1214a hava vent sær til kommununa við ynski um marknaumskipan millum matr.nr. 1224 og 1214a.
Samstundis ynskja tey, at kommunala brekkan millum Jørundsgøtu og matr.nr. 1224 verður breiðkað uml. 1 metur. Breiðkanin ber í sær, at matr.nr. 1214a má lata kommununi ein 1 metur breiðan geira framvið norðurmarkinum.

Eigararnir av matr.nr. 1224 og 1214a eru kunnaðir um,

- at eftirverandi vídd hjá matr.nr. 1224 ikki kann vera minni enn 300 m^2
- at keypsprísur kommununnar er kr. 110,-/m^2
- at við marknaumskipanini verður brekkan matrikulerað 1 metur breiðari enn í dag,
- at spurningurin um, nær sjálvt arbeiðið við vegabreiðkanini verður gjørt, ikki er partur í hesi viðgerðini, men kann takast upp til raðfestingar seinni, tá/um býráðið samtykkir fyriliggjandi marknaumskipanarnarumsókn

Burðardygd og heimsmálini:
Nr.11 – burðadyggir býir og býlingar

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu

Fíggjarligar avleiðingar:
Uml. kr. 5.000,- fyri lendi og matrikulering. Fíggjast av *Byggibúning Bústaðir*

Tilmæli:
Mælt verður til at taka av møguleikanum um keyp av lendi til brekku og at viðmæla marknaumskipan millum omanfyrinevndu ognir.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. juni 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-06-2025.

Tekniska Nevnd 18. juni 2025:
Nevndin tekur undir við UBN 16-06-2025.

Fíggjarnevndin 24. juni 2025:
Nevndin tekur undir við TN 18-06-2025.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Tilmælið frá FíN 24-06-2025 einmælt samtykt.

54/25
25/00537-5 Umsókn um keyp av lendi undir hjallum í Gerðum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.06.2025	76/25
2 Mentanarnevndin	17.06.2025	51/25
3 Fíggjarnevndin	24.06.2025	78/25
4 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	54/25

25/00537-5 Umsókn um keyp av lendi undir hjallum í Gerðum

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr.nr. 1564 søkir um loyvi at keypa matr.nr. 1653 í Gomlu Gerðum. Matr.nr. 1653 eru tveir smáir lutir uppá 9 og 15 m^2, staðsettir inni á matr.nr. 1564. – Lutirnir eru í matriklinum skrásettir sum lendi undir hjallum.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:

Byggisamtyktarligar viðurskifti:
Økispartur D5 – Grønt øki – fult bygt
Ognarviðurskifti og servituttir:
Matr.nr. 1564:
- Eigari: umsøkjari (síðani 2015)
- Servituttur í skeyti dagf. 2. febr. 1978 frá Klaksvíkar kommunu til fyrrverandi eigara: *Byggjast kann ikki á stykkinum.*
- Servituttur sambært matrikuldómi frá 1970: Matr.nr. 1653 hevur gongurætt til og uttanum hjallarnar á hesum eigindómi

Matr.nr. 1605:
- Eigari: umsøkjari (síðani 2015)

Matr.nr. 1653:
- Eigari: Klaksvíkar kommuna
- Servituttur sambært matrikuldómi frá 1970: Karl Joensen eigur hjallarnar á hesum eigindómi

Burðardygd og heimsmálini:
-

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna byggisamtyktin
Kunngerð nr. 122 frá 22. des. 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Fíggjarligar avleiðingar:
Áleið útreiðsluneutralt

Tilmæli:
Vísandi til

- ásetingarnar í Almennu Byggisamtyktini um, at D5-økið er fult bygt
- servituttin fyri matr.nr. 1564 um at byggjast kann ikki á stykkinum
- servituttin frá matrikuldóminum um, at hjallarnir eru ogn hjá eigaranum av matr.nr. 1605
- at talan er um lítla vídd (24 m^2), har bygningarnir omaná ikki eru ogn kommununnar, og sølan tískil er heimilað í §2, stk.3 í kunngerðini um alment útboð av kommunalari fastogn og
- at uml. 16 m^2 av matr.nr. 1564 liggja út í kommunala vegøkið

mælir Tekniska Fyrisiting til at leggja upp til makaskifti millum kommununa og matr.nr. 1564, soleiðis at kommunan yvirtekur teir uml. 16 m^2 úti í vegnum frá matr.nr. 1564, meðan matr.nr. 1564 yvirtekur teir 24 m^2 undir hjallunum.

Tilmælið er treytað av:

- at matr.nr. 1653 verður samanlagt við matr.nr. 1564 og harvið lagt undir somu servituttir sum tað
- at teir uml. uml. 8 m^2 á muni verða seldir fyri kommununnar fasta snøkla-prís uppá kr. 110,-m^2,
- at byggisamtyktarmarkið millum D5 og A10 verður dagført samsvarandi makaskiftu vegalinjuni
- at umsøkjarin og kommunan bera útreiðslurnar fyri tinglýsing og matrikulering saman – helvt til hvønn partin.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. juni 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-06-2025.

Mentanarnevndin 17. juni 2025:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-06-2025

Fíggjarnevndin 24. juni 2025:
Nevndin tekur undir við 17-06-2025.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Tilmælið frá FíN 24-06-2025 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

55/25
25/00751-1 Víðarisøla av matr.nr. 25h, Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.06.2025	73/25
2 Fíggjarnevndin	24.06.2025	79/25
3 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	55/25

25/00751-1 Víðarisøla av matr.nr. 25h, Norðoyri

Frágreiðing um málið:
Eigarnir av matr.nr. 25h, Norðoyri hava søkt um loyvi at víðariselja matr.nr. 25h, Norðoyri sbrt *Reglugerð fyri víðarisølu av útgrivnum kommunalum grundstykkjum*, eftir leisti A.

Grundstykkið bleiv keypt í des. 2021 og seinni útgrivið og planerað.

Keypsprísur á	kr. 125.520,00,-
Útgrevstur og planering á	kr. 325.000,00,-
Tils.	kr. 450.520,00,-

Burðardygd og heimsmálini:
-

Lógargrundarlag:
- *Kommunufulltrúin*
- *Reglugerð fyri víðarisølu av útgrivnum kommunalum grundstykkjum, støða A.*

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

Tilmæli:
Mælt verður til at loyvi víðarisølu áljóðandi 450.250,00,-

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. juni 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-06-2025.

Fíggjarnevndin 24. juni 2025:
Nevndin tekur undir við UBN 16-06-2025.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Tilmælið frá FíN 24-06-2025 einmælt samtykt.

56/25
25/00701-2 Gólvið í KÍ-høllini – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2025	47/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	47/25
3 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	56/25

25/00701-2 Gólvið í KÍ-høllini

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. mai 2025.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 200.000,- verða fluttar frá *Stuðul til mentan* til *Ítróttarøkið íløga*, og kr. 100.000,- verða fluttar frá *Sparkivallir/spælipláss íløga* til *Ítróttarøkið íløga*.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur undir við mentanarnevndini.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-05-2025, og at ein kunning um samlaða kostnaðin, verður við í málinum til seinnu viðgerð.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá FíN 26. mai 2025 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Tilmælið frá BýR 28-05-2025 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

57/25
25/00772-1 KÍ-høllin – Hølini í norðurendanum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	17.06.2025	45/25
2 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	57/25

25/00772-1 KÍ høllin – Hølini í norðurendanum.

Frágreiðing um málið:
Vísandi til mál *20/00628 Norðurendin í KÍ-høllini, virksemi*, hevur verið ávísur ivi um, hvat er galdandi fyri hesi hølir.
Fyrisitingin hevur gjøgnumgingið málið, har tað framgongur, at býráðið tann 17/12-2020 samtykti, at KÍ fær atgongd til økini frá 1/1-2021, og skal hetta skiljast, at KÍ helst hevur fyrsta rætt til hesi hølir.

Klaksvíkar Býráð 17. desember 2020:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Jógvani Skorheim: Mælt verður til at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 2. des. 2020, so KÍ fær atgongd til hølini frá 1. jan. 2021; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (JS, TJL, KEZ, ÓML, BK, ASJ, BJ, HJS og ÓK) og 2 atkvøðum ímóti (SVJ og GvK).

Síðani samtykti býráðið tann 25/3-2021 í sama máli at taka undir við teirri reglugerð, sum leiðarin fyri Klaksvíkar Ítróttardepil hevur evnað saman við ítróttarfeløgunum, sum virka í høllini.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin og býráð taka undir við uppskotinum, sum leiðarin fyri Klaksvíkar Ítróttardepil hevur evnað til saman við feløgunum, ið virka í økinum.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

Burðardygd og heimsmálini:
Hetta málið stuðlar undir 3. heimsmáli, sum er at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar fíggjarligar avleiðingar

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin staðfestir, at tað er Klaksvíkar kommuna, sum avger, hvat mittasta og vestasta hølið í norðurendanum í KÍ-høllini verða brúkt til.

Mentanarnevndin 17. juni 2025:
EÓP luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni
Ein meiriluti, SVJ, ST og HRS, staðfestir býráðssamtyktina frá 25-03-2021 og tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-06-2025.
Ein minniluti ASJ tekur støðu í býráðsfundinum

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
EÓP og JS luttóku ikki í viðgerðini vegna ógegni.
Atkvøtt varð um tilmælið frá umsitingini, dagf. 5. juni 2025; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, ASB, MáL, SVJ og ST) og ongari atkvøðu ímóti; OáL, FZ og ASJ atkvøddu ikki.

58/25
25/00557-3 Leiga av norðurendanum av KÍ-høllini til Snjallubjallu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	20.05.2025	30/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	46/25
3 Mentanarnevndin	17.06.2025	46/25
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.06.2025	39/25
5 Fíggjarnevndin	24.06.2025	69/25
6 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	58/25

25/00557-3 Leiga av norðurendanum av KÍ-høllini til Snjallubjallu

Frágreiðing um málið:
Umsitingin greiðir nærri frá málinum í skrivi dagf. 6. mai 2025.

Í stuttum snýr málið seg um, at frítíðarskúlin Snjallabjalla hevur tørv á eini uppnormering við áleið 30 børnum. Hetta hevur við sær, at stovnurin hevur tørv á at fáa onnur hølir afturat teimum verandi í áleið 2 ár, so at rúm verður fyri hesum børnunum.

Á fundi er avtalað, at Snjallabjalla kann brúka part av norðurendanum á KÍ-høllini til frítíðarskúla frá á sumri 2025 og tvey ár fram.

Burðardygd og heimsmálini:
3. heimsmál: Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

Lógargrundarlag:
Dagstovnalógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Í samband við hesa møguligu loysn, so hevur umsitingin gjørt eina metta kostnaðarmeting av 1. hálva árinum.

Lønar- og rakstrarútreiðslur:	kr.	550.000 í 6 mør.
Keyp av innbúgvi:	kr.	150.000 (Hetta er okkara boð út frá tilboði til Fjallafípuna frá feb. 2023)
Húsaleiga:	kr.	60.000 í 6 mør
Ymiskt ísbv stovnan:	kr.	100.000 (tekøkur og arbeiði í samband við tekøkin og annað)
Ialt:	**kr. 671.000 til stovnan og rakstur í 2025**	

Hædd má sjálvandi takast fyri, at tað eru fleiri ókendir faktorar enn, men hetta verður mett sum ein skikkað kostnaðarmeting.

Leigumálið í ovaru hæddini í Heygabúðini er sagt upp tann 30.04.25. Uppsagnartíðin er 6 mør. Húsaleigan til Heygabúðina er kr. 10.200 um mør., og hon verður goldin av *Barnaansing felags*. Her verður nakað av peningi spardur framyvir.

Tilmæli:
Umsitingin mælir trivnaðarnevndini Børn & Ung til, at partur av virkseminum hjá frítíðarskúlanum Snjallubjallu verður í parti av norðurendanum av KÍ-høllini tíðarskeiðið frá summarinum 2025 og tvey ár fram til summarið 2027 og at játta kr. 671.000 til stovnan og rakstur fyri 2025.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 20. mai 2025:
Ein meiriluti, ASB, AíT og HRS, tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-05-2025.
Ein minniluti, ASJ, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Málið útsett til komandi nevndarumfar, málið skal tá í allar viðkomandi nevndir.

Mentanarnevndin 17-06-2025:
EyÓP luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.
Ein meirluti, SVJ, ST og HRS taka undir við tilmælinum, dagf. 06-05-2025 og mælir til at allir brúkarnir vera við í tilgongdini at skipa nýtsluna av hølinum.
Ein minniluti, ASJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. juni 2025:
EÓP luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.
Ein meiriluti, AíT, HRS og SVJ, tekur undir við meirilutanum í MeN, dagfest 17. juni 2025.
Ein minniluti, ASJ, tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 24. juni 2025:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Ein meiriluti, KHJ, SVJ og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-05-2025.
OáL tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
EÓP og JS luttóku ikki í viðgerðini vegna ógegni.
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 24-06-2025; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, ASB, HRS, MáL, SVJ og ST) og ongari atkvøðu ímóti; OáL, FZ og ASJ atkvøddu ikki.

59/25
25/00531-17 Goymslu- og framsýningarhøli til Rospiggen II

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.06.2025	80/25
2 Mentanarnevndin	17.06.2025	48/25
3 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	59/25

25/00531-17 Goymslu- og framsýningarhøli til Rospiggen II

Frágreiðing um málið:
Tað hevur í longri tíð verið ynski um, at báturin Rospiggen II skal verða partur av Vevskúlanum. Fleiri uppskot eru gjørd til ymsar savnsbygningar uppat Vevskúlanum, men hava hesar ofta verið ov rúgvusmiklar og av tí sama kostnaðarmiklar og tí ikki framdar.

Nú er uppskot gjørt til eitt sjálvstøðugt “neyst” sunnanfyri Vevskúlan.

Mettur kostnaður:

Goymslu- og framsýningarhøli kr. 12.000/m^2 x 62	kr.	744.000
WC, leiðingar o.a.	kr.	350.000

Annað ókent	kr. 100.000
Tilsamans	kr. 1.200.000

Byggingin liggur í D2-øki sambært byggisamtyktini, sum er "Grønt øki", har vanliga ikki verður loyvt bygging.

Býarskipanarliga
Ætlaða aftratbygging liggur í D2, sum er *grønt øki* og útlagt sum 100% fríøki. Tá ið byggisamtyktin varð gjørd fyri økið, kom Vevskúlin úti í Grøv at liggja í D2; tó hevur virksemið í skúlanum kunna hildið ótarnað fram, og umvælingar eru gjørdar á skúlan eisini.

Býráðið hevur nýliga loyvt frávík til bygging í D2 ísb. við landbúnað. Tað var á grannaognini. Hetta var m.a. gjørt við teirri grundgeving, at ætlaða nýbygging gjørdi, at seyðahúsið bleiv hóskiligt til nútímans nýtslu. Umsitingin metir, at nakað tað sama kann sigast um hesa ítøkiligu ætlan við nýbygging av neysti og savni beint uppat Vevskúlanum úti í Grøv – tó liggjandi nakað lægri í lendinum við gilið sunnanfyri bygningin.

Byggingin verður skipað soleiðis, at gilið, har á rennur, ikki verður skalað. At runnar og størri steinar, sum eru í skráninginum sunnanfyri bygningin og eru sereyðkenni fyri økið, ikki skulu ávirkast av byggingini – at atlit verður tikið fyri hesum!

Burðardygd og heimsmálini:
11. Mál. Gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Neyðugt er at seta av til endamálið á komandi fíggjarætlan

Tilmæli:
Mælt verður til:
1. at frávik verður játtað frá byggisamtyktini fyri økið, so nevnda bygging kann verða loyvd her
2. at tað í fyrsta umfari verður játtað prinsippielt byggiloyvi fyri nevndu bygging
3. at grannahoyring verður fyri byggingina
4. at Tekniska Umsiting fær høvi at projektera neyvari, so eitt myndugleikaprojekt fyriliggur, sum endaligt byggiloyvi verður játtað eftir
5. at Tekniska Umsiting fær høvi at projektera neyvari, so byggingin kann bjóðast út og neyvari kostnaðarmeting gerast í tráð við projektið
6. at býráðið á komandi fíggjarætlan setur pening av til endamálið at fremja byggingina fyri – mettur kostnaður kr. 1.200.000.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. juni 2025:
Nevndin tekur í høvuðsheitum undir við málinum men metir, at bygningurin eigur at kunna at gerast bíligari og arkitektoniskt «nettari». Málið verður at leggja fyri nevndina aftur.

Mentanarnevndin 17. juni 2025:
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 16-06-2025, og mælir til at staðsett bygningurin verur staðsettur so tætt upp at vegnum, sum byggilinjan loyvir.

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Atkvøtt varð um broytingaruppskoti frá Jógvani Skorheim um at taka undir við pkt. 1-5 í tilmælinum frá umsitingini, dagf. 5. juni 2025, og at málið verður tikið upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2026; tað varð einmælt samtykt.

60/25
21/01331-119 Broyting av beni - matr.nr. 1646i - Ídnaðarøkið undir Hamri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.06.2025	81/25
2 Havna- og Vinnunevndin	17.06.2025	32/25
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.06.2025	87/25
3 Tekniska Nevnd	18.06.2025	47/25
4 Fíggjarnevndin	24.06.2025	73/25
5 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	60/25

21/01331-119 Broyting av beni - matr.nr. 1646i - Ídnaðarøkið undir Hamri

Frágreiðing um málið:
Ein fyrispurningur/umsókn er komin frá eigaranum av matr.nr. 1646i um broyting av beninum vestan- ella omanfyri ætlaða bygningin, sum kommunan hevur givið byggiloyvi til.

Samskifti við umsøkjaran seinastu árini hevur vístur, at eigarin hevur ávísar avbjóðingar við staðseting av stóra bygninginum og tilbygningum á økinum. Ætlanin hjá eigara umfatar bygging tætt upp at høga beninum omanfyri.

Eigarin hevur tí eitt ynski um, at benið verður flutt longur niðan, og at ein hill verður gjørd, sum skal forða fyri, at leyst grót dettur niður á bygningarnar.

Umsitingarligar viðmerkingar:
- Klaksvíkar kommuna hevur arbeitt við einum máli um eitt ídnaðarøki á Borðoyarvík seinastu 25 árini, og tá farið varð undir Norðoyatunnilin, so varð arbeitt aktivt við málinum, har ætlanir vóru frammi um bæði kommunala verkætlan og privata.
- Býráðið samtykti í 2017/18 at fara undir eina kommunala verkætlan, sum skuldi bjóðast út sum ein heildararbeiðstøka, har ráðgevandi verkfrøðingur skuldi taka sær av arbeiðinum sum byggiharraráðgevi fyri kommununa. Ein greið treyt fyri ætlanina var, at benið aftanfyri bygningarnar skuldi fremjast við hillum, soleiðis at talan bleiv um eina "grøna" verkætlan.
- Tá "Ídnaðarøkið undir Hamri" skuldi góðtakast av kommununi, kom undan kavi, at fleiri av grundstykkjunum vóru ov smøl, og tí kom spurningurin upp - saman við arbeiðstakaranum - um vegurin skuldi flytast, ella benið brekkast longur vestur ella niðan. Valt varð at brekka benið longur niðan, við tí avleiðing at norðasta hillin omanfyri grundstykkið, matr.nr. 1646i, bleiv burtur.
- Ynski hjá eigara um at brekka/spreingja longur niðan viðførir, at komið verður niðan í økið hjá Uppsalahaga, og tí skal ein loysn finnast á lendismálinum. Talan er um áleið 400 fermetrar.

- Vegna árinið á hagan leigar kommunan lendið omanfyri ídnaðarøkið frá Uppsalahaga. Leigusáttmálin gongur út í ár, og tí verður helst neyðugt at leingja sáttmálan, til hagin kann brúkast aftur?
- Hóast avbjóðingar kunnu standast av at flyta benið longur niðan, so er fyrisitingin positiv viðvíkjandi málinum, tí ætlanin hjá kommununi er, at nýggj stykkir suðureftir skulu so vítt gjørligt gerast á landi og ikki so nógv út á sjógv.
- Málið viðførir, at fleiri spurningar skulu greiðast, s.s. um eigarin skal leiga ella keypa lendið, skal kommunan ella eigarin samráðast við Uppsalahaga, framhaldandi leiga av lendinum omanfyri økið o.a.

Burðardygd og heimsmálini:
Vísandi til tey 17 heimsmálini, sum Føroya Landsstýri og Klaksvíkar kommuna taka undir við, kunnu nevnast mál nr. 9 Vinna, nýskapan og undirstøðukervi og mál nr. 11 Burðardyggir býir og býlingar.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin, umhvørvislógin (umhvørvisgóðkenning), byggilóggáva o.a.

Fíggjarligar avleiðingar:
Leisturin, ið eigari av matr.nr. 1646i søkir loyvi um at fremja, skal fyri Klaksvíkar kommunu verða útreiðsluneutralur. Eigari av matr.nr. 1646i átekur sær at fremja og gjalda arbeiði við tilhoyrandi arbeiðstrygging.

Tilmæli:
Mælt verður til, at arbeitt verður við at endurnýggja/leingja sáttmálan við Uppsalahaga; mælt verður eisini til at gera avtalu við eigara av matr.nr. 1646i um fremjan av ætlaða arbeiðinum, sum í minsta lagi skal vera útreiðsluneutralt.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. juni 2025:
Signhild V. Johannesen fór av fundinum, tá málið skuldi viðgerast. Hetta viðførdi tó, at nevndin tá ikki var viðtøkufør. Avrátt varð tí, at málið verður viðgjørt á serstakum fundi í nevndini í morgin, 17. juni, tá nevndin vónandi er viðtøkufør.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. juni 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-06-2025, og mælir til at royna at keypa lendið frá Uppsalahaga heldur enn at leiga.

Havna- og Vinnunevndin 17. juni 2025:
Signhild V. Johannesen var ikki við í viðgerðini, vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 17-06-2025.

Tekniska Nevnd 18. juni 2025:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við HaVN 17-06-2025.

Fíggjarnevndin 24. juni 2025:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við TN 18-06-2025.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Klaksvíkar Býráð 26. juni 2025:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 24-06-2025 einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

61/25
21/01784-108 Eystan Garð

62/25
24/01013-16 Innafturtøka av stykki

63/25
24/00581-3 Møgulig søla – støðutakan

64/25
22/00079-3 Leigusáttmáli

65/25
24/01153-9 Leigusáttmáli

66/25
25/00280-3 Keyp/leiga av ogn

67/25
25/00467-18 Íbúðaverkætlan - støðutakan

68/25
25/00816-1 Møgulig víðkan av øki

69/25
22/00675-11 Útbygging av dagstovni

70/25
25/00690-11 Møgulig søla – støðutakan

Fundurin lokin kl. 22.00